Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Henrik Old, løgtingsmaður

Svarari: Eirikur í Jákupsstovu, landsstýrismaður í almanna- og mentamálum

Evni: Um umvæling av Hamragarði

Spurningar:

1) Hví eru umvælingarnar av røktarheiminum Hamragarði ikki byrjaðar?
2) Nær kann væntast, at arbeiðið verður sett í gongd?

Viðmerkingar:
Eftir at røktarheimið Hamragarður varð avhendað fyri 14 árum síðani, vórðu fleiri manglar og feilir staðfestir. Tann neyðuga umvælingin er ongantíð framd, og standurin er bara versnaður seinnu árini. Avleiðingin er millum annnað, at til ber ikki at hava fult virksemi á røktarheiminum í vetrarhálvuni.

Landsverk hevur mett, at umvælingarnar av Hamragarði fara at kosta góðar 17 mió. kr., og í januar samdust kommunurnar í sunnaru helvt av Suðuroynni og Landsverk um, hvussu útreiðslurnar skuldu býtast. Løgtingið hevur í fíggjarárinum 2025 játtað neyðuga peningin, so umvælingin kann fara í gongd.

Men enn er eingin umvæling farin í gongd á Hamragarði. Tað var annars upplýst fyri Løgtinginum, at tað var umráðandi, at arbeiðið varð sett í gongd um summarið, tí vánaligt veður kann darva umvælingini.

Fyri at fáa greiðu á hesum ivamálum, verður hesin fyrispurningur settur avvarðandi landsstýrismanni.

Á Løgtingi, 19. juni 2025

Henrik Old